## Summarstjørnur í Atlantis

5 juli verður forvitnisligur fyrilestur um stjørnur og gongustjørnur í mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík.

Tað verður stjørnufrøðingurin Lars Petersen, sum fer at halda fyrilesturin við heitinum "Summarstjørnur", ið snýr seg um stjørnur og gongustjørnur, ið vanliga eru at síggja á himmalhválvinum um summarið.

Um summarið eru ikki nógvar stjørnur og gongustjørnur at síggja á himmalhválvinum. Tó ber til at síggja einstøk klár himmallikam, og í fyrilestrinum fer Lars at greiða frá, hvussu ein finnur hesi, og ymiskt annað áhugavert um stjørnufrøðina.

Eisini verður greitt frá um ta "totalu" sólarmyrkingina, ið verður í 2015, sum einans verður sjónlig í Føroyum og á Svalbard.

Fyrilesturin varir umleið hálvan annan tíma. Aftáná verður orðið frítt, og møguleiki verður at seta stjørnufrøðinginum spurningar.

Lars Petersen er útbúgvin stjørnufrøðingur á Aarhus Universitet. Hann hevur arbeitt við fleiri observatiónsverkætlanum á teimum Kanarisku Oyggjunum og í Chile. Hann starvast nú sum dagligur leiðari á Orion Planetarium í Suðurjútlandi, og hevur nógvar royndir við frálæru í stjørnufrøði, sum fyrilestrahaldari, umframt at hann hevur skrivað nógvar vísindaligar blaðgreinir um stjørnufrøði.

Meir er at síggja um hesi evni á heimasíðuni hjá Orion Planetariuminum www.orionplanetarium.dk

ave

## Smyril (Falco columbarius)



**Í Føroyum reiðrast bert heilt fáir smyrlar, kanska einans 5 - 10 pør**

FUGLAR

At talan er um so sjáldsaman fugl og at hann reiðrast har óatkomiligt er, ger tað sera trupult at avmynda reiður, ungar og egg.

Men her er ein mynd, ið er tikin fyri fáum døgum síðani.

Neyðugt var at síga einar 10 metrar niður til eitt holuskapilsi í fjallavegginum, fyri at koma til reiðri. Har lógu tveir ungar og tvey egg. Sum tað sæst á myndini, so er reiðrið rættuliga stórt, og fleiri beinagrindir liggja innanvert sjálvt reiðrið.

Smyril er ein falkur, og falkar eru nógv ynskisverdir at hava í fangilsi, tí verður vanliga ikki kunnað um, hvar smyril reiðrast, heldur ikki í hesum føri.

*Mynd og tekstur: Bergur Mikladal*



*Um mánaðarskifti fara hesir ungu leikarnir úr Nólsoyar Barnasjónleikaraskúla at luttkaka á stórari H.C. Andersen sjónleikarastevnu í Slagelse*

# Nólsoyarbørn á H.C. Andersen sjónleikarastevnu

**Um mánaðarskiftið fer Nólsoyar barnasjónleikaraskúli at luttaka á stórari H.C. Andersen sjónleikarastevnu í Slagelse**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, hevur nógv jørn í eldinum. Herfyri frættist, at felagið í næstum sendir 10 ungir klaksvíkingar á sjónleikarastevnu í Litava. Og nú er túrurn so komin til børn í Nólsoy. MáF hevur nevniliga eisini skipað fyri, at ein bólkur av barnasjónleikarum úr Nólsoy verður við á stóru H.C. Andersen sjónleikarastevnuni, ið byrjar í Slagelse 27. juni. Átta bólkar verða við, og eru teir úr Danmark, Noregi, Finlandi, Føroyum, Letlandi, Litava og Kuba. Børnini eru 9-16 ára gomul.

Bólkarnir koma við einum sjónleiki hvør, ið er inspireraður av ævintýrum H.C. Andersens. Sjónleikin hava allir bólkarnir gjørt í vár, teir hava havt frumsýningar, og nú eru ungu sjónleikarnir so klárir til stóru stevnuna.

### Eldsálir

Í Nólsoy hava tey spælt sjónleik, síðan Bygdarfelagið Royndin stovnað í 1918. Barnasjónleikaraskúlin byrjaði virksemi sítt seinast í 80'unum. Seinastu 5 árini hevur kommunan goldið til skúlan, men nógv av arbeiðinum er sjálvboðið. Í løtuni ganga 22 børn og ung á skúlanum.

Tað eru eldsálirnar í Nólsoy, Gunnvør og Hilmar Joensen, ið fara við Nólsoyarbørnum til Slagelse, hon sum leikstjóri og hann sum ljós- og ljóðmaður og sum tónleikari. Foreldur hava saman við Gunnvør og Hilmari seymað búnar og gjørt pallmynd.

H.C. Andersen sjónleikarastevnan í Slagelse byrjar alment við einum stórum gøtusjónleiki týsdagin 28. juni, og kl. 14.30 fríggjadagin 1. juli spæla Nólsoyarbørn á Slagelse Teaters lille scene.

## Leikalund – Føroya fyrsta bókakafé

Leygardagin 25. juni er sum kunnugt ein stórur dagur í Klaksvík, tí tá verður Norðoyatunnilin skotin ígjøgnum. Í hesum sambandi víðkar Leikalund um virksemi sítt við at lata upp bókakafé í handlinum.

Leikalund hevur í longri tíð havt ætlanir um at víðka um virksemið í handlinum. Tískil fara tey nú at selja ymisk sløg av kaffi, te, kakao og okkurt lætt afturvið, sum kann njótast í hugnaliga umhvørvinum í gamla handlinum úti í Klaksvík.

Bókakaféir eru eitt vanligt fyribrigdi í øðrum londum, og er hetta hugtak nú eisini komið til Klaksvíkar. Nú kunnu fólk koma inn og njóta bøkur og tónleik á ein øðrvísi hátt. Tú kanst geva tær góðar stundir at hyggja eftir bókum, lurta eftir tónleiki, og samstundis njóta ein góðan kaffimunn og fáa eitt gott prát.

Bókakaféin er opin somu tíðir, sum handilin er opin, men sum nakað nýtt víðkar Leikalund nú eisini um upplatingartíðirnar:

| | |
|---|---|
| Mán. - mik. sum vanligt | 10.00-17.30 |
| Hós.-leyg | 10.00-23.00 |
| Sun. | 15.00-23.00 |

**ave**

## Jóansøkubál við hugna í Hvalvík

JÓANSØKA

Av tí at ongi tiltøk hjá skótaliðnum Borgini vóru hildin flaggdagin, verða ymisk tiltøk á skránni leygardagin 25. juni 2005.

Byrjað verður við barnagarðin í Hvalvík kl 16, har gyklarin Rógvi fer at undirhalda børnunum. Síðani verður tombola, lutaseðla- og kaffisøla, seymsláing, káti køkurin og kondi-bingo á skránni.

Umleið kl 18 verður fest í árliga jóansøkubáli, Sigvald Zachariassen sigur nøkur orð, og vit fara at syngja úr »Grønu bók«.

Sum vanligt verður høvi eisini til at keypa pylsur at snerkja, meðan vit hugna okkum við bálið, sum verður við Stórá ímillum barnagarðin og skúlan, sigur Skótaliðið Borgin.